## út at koyra




## Lupo Umhvørvisvirðisløn

VW Lupo 1,4 16V fekk »Miljøpris 1999« frá bilblaðnum Bilen Motor & Sport.

Endamálið við virðislønini er at heiðra tey framstig, sum bilverksmiðjurnar gera fyri umhvørvið og brúkaran.

**Kelda: Bil Snak**

## Toyota væl frá byrjan

Toyota fekk góða byrjan í Danmark og Europa sum heild í ár. Við eini sølu uppá 12,2% av marknaðinum bleiv Toyota mest selda bilmerki í Danmark í januar- og februarmánað.

**Kelda: Toyota Danmark A/S**



## Renault Scénic RX4

Í juni kemur Renault Scénic við 4 hjólstrekki. Scénic RX4 hevur 2.0 motor við 140 hk, permanent 4 hjólstrekk, ið er gjørt í samstarvi við Steyr Daimler Puch í Eysturríki.

**Kelda: Volvo Personvogne Danmark A/S**

# BMW-700 røðin: Koyring við ryggfimleiki






Magnus Gunnarsson

Tey, sum koyra við BMW-700 røðini, hava møguleika at røra seg aftan fyri rættið, uttan at flyta seg. Sameiningin av aktivari og passivari trygd hevur gjørt fleiri av teimum dýru bilunum sera tryggar og góðar at koyra í, og BMW-700 er einki undantak í so máta.

Tað at sita væl tá tú skalt koyra langt hevur stóran týdning fyri trygdina og trivnaðin.

*Við hesum setrinum hjá BMW fær førarin flutt seg í setrinum, uttan at skula røra seg. Undir setrinum eru tvey hydraulisk rúm við einari blanding av glycerin og vatni í hvør sínari síðu, ið verða skiftivís fylt og tømd soleiðis, at blóðið fer í umferð, og vøddarnir verða virknir*

### Ryggvøddarnir røra seg undir koyring

BMW hevur gjørt eitt bilsetur, ið fær ryggvøddarnar at røra seg undir koyringini, fyri at bilførarin ikki skal verða til ampa fyri ferðsluna, um hann verður illa tilpassar.

Við at sita leingi í somu støðu, kunnu spenningar koma í ryggvøddarnar av tí, at ryggurin verður skeivt belastaður. Tá er tað, at tú flytir teg í setrinum fyri at rætta uppá skeivleikan.

### Merkist næstan ikki

Við hesum setrinum hjá BMW fær førarin flutt seg í setrinum, uttan at skula røra seg. Undir setrinum eru tvey hydraulisk rúm við einari blanding av glycerini og vatni í hvør sínari síðu, ið verða skiftivís fylt og tømd soleiðis, at blóðið fer í umferð, og vøddarnir verða virknir.

Hetta merkist næstan ikki og eftir stuttari tíð hugsar man ikki um hesar røringar í setrinum.

Ein kanning av hesum virkna setrinum vísir, at spenningar í ryggvøddunum verða munandi minni, tá koyrt verða long strekkir. Hetta hevur vælveru við sær, og bilførarin verður meira árvakin undir koyringini, og trygdin hækkar munandi.

Hesi setur fáast sum frammsetur til BMW-700 røðina.

**Kelda: BMW Aktuelt**




*Nei, James Bond vitjar ikki løgmann! Men tað er slíkan sportbil, James Bond 007 hevur koyrt í, í seinastu filmunum. Hetta vilja bretar nú broyta*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

# Bretar boykotta BMW

Eirikur Lindenskov

Fakfeløg og politikarar í Bretlandi mæltu í síðstu viku bretum til at boykotta týsku bilaverksmiðjuna BMW. Hetta skuldi verða gjørt til tess at revsa BMW, tí at týskararnir hava gjørt av at selja bretskja tjóðareyðkennið, Rover.

– Um bara helmingurin av søgunum um BMW eru sannar, so hava teir uppført seg undir alt lágmark, og bretska fólkið eigur at vísa sína ónøgd við at boykotta BMW, segði John Edmonds, fakfelagsleiðari, við bretska blaðið The Times.

Fakfeløgini óttast, at sølan av Roververksmiðjunum fer at merkja, at fleiri túsund fólk verða søgd úr starvi.

Eisini politikarar stuðla bretska boykottinum av týskum luxusbilum.

– BMW hevur uppført seg ljótt. Eg fari ongantíð at keypa mær ein BMW, segði ein limur í undirhúsinum.

Ein annar fakfelagsleiðari skjeyt upp, at framferðarhátturin hjá BMW eigur at fáa avleiðingar heilt inn í bretsku fregnartænastuna.

– James Bond noyðist nú at skifta sín BMW-sportbil út, helt hann.

– 007 er eitt altjóða symbol upp á bretskt fedralandskærleika, og tað er tí óhugsandi, at hann skal halda fram við at koyra í einum slíkum bili, heldur fakfelagsleiðarin, Sir Ken Jackson.



## út at koyra




# Daewoo Matiz til summar og sól

Magnus Gunnarsson

Suðurkoreanska Daewoo fyritøkan, ið varð stovnað í 1967, hevur gjørt bilar í mong ár í samstarvi við Mercedes og General Motors.

Umframt bilar gera teir eisini harðar hvítvørur, teleútgerð, flogfør, trukkar, eins og teir hava skipasmiðjur og annan tungan ídnað.

### Praktiskur bilur í 100.000 kr klassanum

Fyrstu bilarnir frá Daewoo Motor Company, sum komu higar til lands fyri nøkrum árum síðan, vóru somu bilar, sum Opel Kadett við smáum broytingum og Daewooemblemum. Nú hava allir Daewoo bilarnir sjálvstøðug snið, og ein av teimum er hesin lítli Matiz.

Daewoo Matiz er ein praktiskur bilur í kr 100.000 klassanum. Matiz fær teg at hugsa um ein nýmótans Citroen 2CV, ikki tí teir líkjast á nakran hátt, men kanska tí hann er líka høgur, sum hann er breiður, hevur tak, sum kann rullast afturav og lítlan motor.

### Rúmligur innanfyri smáar karmar

Matiz er rúmligur, tá hugsað verður um støddina á bilinum. Konstruktørarnir hava gjørt ein rúmligan bil innan fyri teir smáu karmarnar, ið teir hava havt at arbeitt við. Bilurin kann brúkast, sum um tað var ein størri bilur, talan var um.

Koyrieginleikarnir eru so góðir, at bilurin fyri tann skuld kundi havt munandi størri motor. Eisini í vindi klárar Matiz seg væl. Motorurin er ein 3 cyl. við 800 ccm og 51 hk, so tað ræður um at brúka megina, sum er at ráða yvir.

### Matiz, ein sermerktur bilur

Viðførisrúmið er ikki stórt, gott 100 litrar, men við at leggja baksetrini niður, verða 512 litrar til at brúka.

Daewoo Matiz er ein praktiskur og bíligur bilur. Um tveir persónar fara út at ferðast við bilinum, og leggja baksetrini niður, er ikki so lítið pláss til viðførið. Verður tað ov heitt í veðrinum, ber til at fáa góða nyttu av at rulla takið afturav. Matiz SE er væl útgjørdur við t. d. ABS bremsum, dupultum airbag, AM/FM radio, kopphaldara, el-rútar framman, el-rullutak, sentrallás og servostýring. Bilurin er sermerktur og hevur nógvar møguleikar, um teir verða brúktir rætt.



Sterkir menn í sterkum bili… Føroya sterkasti maður, Regin Vágadal, koyrir eisini Daewoo

**Myndir: Jonhard Hammer**



## Daewoo Matiz

**Motorurin:** 3 syl. 800 ccm 6 ventilar við 51 hk

| | |
|---|---|
| **Trekk:** | Framman |
| **Dekkstødd:** | 155/65-13 |
| **Bremsur:** | Skivur framman og trumlur aftan |
| **Bensinnýtsla:** | 15,6 km/l |

**<u>Stødd</u>**

| | |
|---|---|
| **Longd:** | 349.5 cm |
| **Breidd:** | 149.5 cm |
| **Hædd:** | 148.5 cm |
| **Eginvekt:** | 825 kg |
| **Totalvekt:** | 1275 kg |
| **Viðførisrúm:** | 104 litrar |
| Prísir: Matiz S | 99.700,- |
| Prísir: Matiz SE | 109.700,- |

*Søluumboð:*
*P/F Esmar Simonsen*
*Kambsdalur*
*FO-530 Fuglafjørður*

